

# 4 NÝGGJAR VØRUR ÁRLIGA

## VIT MENNA OG FRAMLEIÐA VØRUR ÚR PLASTI

LOOK NORTH




# VØRUYVIRLIT

**EPS**
- Kassar við og við ongum frárensli
- Kassar til flogfrakt
- Blæur til kassar
- Flot til aliringar
- Flot v/holi til fóðurslangur
- Bjálvingarplátur í ymiskum trýststyrkjum
- Kantstrimlar
- Knúst flamingo til blásibjálving
- Leysar perlur til ífyllu
- XPS bjálving

**Prent á kassar**

**Sproytustoypt**
- Stólpar til 500 kg eskjur
- Stólpar til 400 kg eskjur
- Stólpar til smáar eskjur
- Gonguristir
- Búsningar til besløg
- Fuglanet búsningar
- Ketuverju til søkkring
- Lutir til traysarar
- Cones til krabbarúsur
- Plattahorn
- Splittur til skeklar
- Læsiplátur til vindeygu
- Kópakonan
- Proppar

**Termoformað**

**Vit loysa eisini seruppgávur so sum:**
- Útsparringar til betong
- Skorið EPS eftir tekning
- Reklamulutir úr EPS

# LOOKNORTH ER PLASTFRAMLEIÐARI

Looknorth varð stovnað á sumri í 2000 og fór undir framleiðslu á vári 2001. Frá byrjan hevur dentur verið lagdur á at menna og økja um vøruúrvalið. Framleiðslan byrjaði við teimum sonevndu „flamingokøssunum" til fiskaídnaðin, men skjótt eftir, longu í 2002, var farið undir at gera flot til aliringar og framleiða bjálvingartilfar til byggivinnuna.

Í 2004 fór virkið at framleiða vørur við sproytustoyping. Nú hava vit tvær maskinur, og vit framleiða meira enn 30 ymiskar vørur úr harðplasti.

Vit hava nógv ymisk amboð. Til dømis kunnu vit skera í EPS eftir tekning og prenta á kassar. Í 2017 hava vit eisini fingið eina termoformingarmaskinu.

Vit vilja alsamt koma í samband við fólk, ið hava hugskot um nýggja vøru, ið kann verða evnað úr plasti. Byrja saman við okkum, vit hava royndirnar, og vit vita, at samstarv skapar møguleikar.












# ENDURNÝTSLA

Looknorth nýtir í størri og størri mun endurnýtsluplast. Vit samstarva millum annað við Kassamiðstøðina, har vit endurnýta gamlar fiskakassar til at framleiða nýggjar vørur. Flest allir kassar, ið eru framleiddir á Looknorth enda aftur sum endurnýtsluplast.

# MEIRA ENN EIN KASSI

Looknorth framleiðir EPS (uppskúmað plast) ella tað, sum tey flestu kenna sum „flamingo“.

Tað er serliga kassaframleiðsla, sum fyllir nógv í framleiðsluni hjá virkinum. Framleiddir verða EPS kassar úr 3 kilo upp í 200 kilo í ymiskum støddum. Flestu kassar fáast bæði tættir og við frárensli. Vit kunnu eisini prenta á kassarnar. Prentast kann í øllum litum.

Vit eru útgjørd við amboðum til at skera í EPS eftir tekning. Tá kunnu vit lættliga gera t.d. útsparringar til byggivinnuna, lutir til reklamuvinnuna og til ymisk festlig høvi.






# BJÁLVING

Vit framleiða bjálvingarplátur í fleiri ymiskum tjúkdum upp til 200 mm. Reglurnar um bjálving verða broyttar av og á soleiðis, at nú er loyvt at brúka okkara bjálving í nógv størri mun enn áður. Nú verður eisini bjálvað meir enn fyrr.

Til serliga nógv trýst, kunnu vit eisini bjóða XPS, ið t.d. kann verða nýtt sum bjálving undir fundament.

Umframt bjálvingarplátur framleiða vit eisini tilhoyr sum kantstrimlar, knúst flamingo og leysar perlur til ífyllu.



*Bjálvingarplátur í ymiskum trýststyrkjum. Stødd: 127x87 cm*



*Bjálvingarplátur úr XPS.*

# FLOT TIL ALIVINNUNA

Vit framleiða ymisk flot úr EPS tilfari til alivinnuna.






# KASSAR VIÐ OG VIÐ ONGUM FRÁRENSLI

**200 kg***
Stødd (LxB): 120x80 cm
Til fiskaflutning og til flutning, har vandin fyri ikki at fáa fatur á returkørum er stórur.
Rúmd: 340 Ltr. *Einki frárensl.

**20 kg**
Stødd (LxB): 80x40 cm
Til fiskaflutning og annað t.d. at goyma epli og mat í.
Hóskar væl til frystigóðs og heitan mat.
Rúmd: 44 Ltr.

**10 kg**
Stødd (LxB): 60x40 cm
Til fiskaflutning og líknandi.
Rúmd: 24 Ltr.

**Hummarakassi***
Stødd (LxB): 40x30 cm, uml. 25 cm í hædd
Millum annað til at flyta livandi hummara.
Rúmd: 15 Ltr. *Einki frárensl.

**5-6 kg**
Stødd (LxB): 50x30 cm
Til fiskaflutning og líknandi.
Rúmd: 11 Ltr.

**3 kg**
Stødd (LxB): 40x30 cm
Til fiskaflutning og líknandi.
Rúmd: 7 Ltr.

**Blæur**
Stødd (LxB): 70x35 cm
Vatnsog: 6 Ltr. pr. blæu +/- 5%
Stødd (LxB): 35x25 cm
Vatnsog: 1 Ltr. pr. blæu +/- 5%









# LOYSNIR ÚR HARÐPLASTI

Vit framleiða vørur og loysnir við sproytustoyping. Framleiðslan fatar millum annað um hornastólpar til saltfiskavinnuna, búsningar og gonguristir til aliringar, traysara til fiskiflotan, splittur til skeklar, plattahorn, læsiplátur til vindeygu, trossaverju, strappahorn, proppar til Sopi drekkajogurt, føroyski leypurin og standmynd av kópakonuni til ferðavinnuna.

Nógvar av hesum vørum eru loysnir, sum eru gjørdar í tøttum samstarvi við aðrar fyritøkur so sum KJ-Hydraulik, MP Teknik, Vónina, Aluplast, MBM og Visit Kalsoy.

Looknorth er framvegis og áhaldandi áhugað í at menna nýggjar loysnir og vil fegin menna tær saman við tær.
























# TERMOFORMING

Við termoforming, kanst tú evna ymiskar lutir. Flestøll munnu kenna kjøtbakkan í kølidiskinum, innleggið í konfekteskjuni og eingangstallerkarnar, men eisini ber til at framleiða meira tekniskar lutir á henda hátt.

# 3D PRINTARI
# VIÐ NÝGGJUM MØGULEIKUM

Looknorth er í støðugari menning, og ætla vit framhaldandi at víðka um vøruúrvalið, so hvørt sum orkan og marknaðurin loyvir tí. 3D printarin er nýggjasta íløgan og gevur møguleikar til eitt nú at hava royndarprint í 3D, áðrenn framleitt verður í størri nøgdum. Eisini er møguligt at framleiða eitt amboð ella ein serligan deil, har einans er brúk fyri tí eina eintakinum ella minni nøgdir.

Við 3D printaranum, kanst tú evna ymiskar lutir og eru møguleikarnir nógvir. Hjartaliga vælkomin at seta teg í samband við okkum um tín tørv og tína framleiðslu.

Byrja tína framleiðslu saman við okkum!










# VIT MENNA OG FRAMLEIÐA VØRUR ÚR PLASTI

**WWW.LOOKNORTH.FO**

P/F Looknorth
Faktorvegur 23
Postsmoga 85
FO-710 Klaksvík
Føroyar
Tel: +298 45 81 00
looknorth@looknorth.fo
www.looknorth.fo

LOOK NORTH